Lýsingin hjá Mentamálaráðnum, sum var í blaðnum leygardagin, skuldi ikki verið komin í blaðið.

Sosialurin

# Brævatkvøður: Tryggast at velja flokk

**Verður valt við brævatkvøðu, ber til at velja ávíst valevni, hóast uppstillingin ikki er liðug. Men best er bara at velja flokk, um trygd skal fáast fyri, at atkvøðan skal telja við**

VAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




Hóast flokkarnir enn ikki eru lidnir við uppstillingarnar, so ber til hjá fólki, sum fara uttanlands og ikki verða heima valdagin at velja kortini. Hetta kann gerast við brævatkvøðum.

Onkur lesari hevur spurt okkum, um tað ber til at velja ávíst valevni, hóast listarnir ikki eru klárir.

Vit hava sett spurningin víðari til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra í Havn. Hann sigur, at tað kortini ikki er so einfalt.

Um fólk skriva navnið á ávísum valevni á brævatkvøðuna, so fær viðkomandi valevnið og flokkurin atkvøðuna – um viðkomandi kemur á listan. Hendir tað, at viðkomandi ikki verður uppstillaður kortini, so verður atkvøðan ógyldug, tí tað ber bara til at velja valevni, ið eru uppstillað.

– Fólk sum fara uttanlands kunnu bara velja flokk, men eru tey vís í, at eitt valevni verður uppstillað, kunnu tey eisini skriva navn hansara/hennara. Verður viðkomandi ikki uppstillað/ur er atkvøðan ógildug, sigur Jens Marius Poulsen.

# Seks valevni á sambandslista í Norðoyggjum

UPPSTILLING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ein kvinna og fimm mans bjóða seg fram sum valevni hjá Sambandsflokkinum í Norðoyggjum, sum hevði uppstillingarfund fríggjakvøldið.

Av tí at bert ein kvinna var á listanum, gav fundurin nevndini heimild til at finna onkra kvinnu afturat, áðrenn listin varð almannakunngjørdur.

– Elisabeth Joensen, býráðslimur hjá Sambandsflokkinum í Klaksvík, hevur boðað frá, at hon stillar ikki upp, sigur John William Joensen, formaður í sambandsfelagnum í Norðoyggjum.

Tískil sær listin fyribils soleiðis út:

Magni Laksáfoss, Streymnes, búskaparfrøðingur
Erika Elttør, Klaksvík, handilskvinna
John Kári Jacobsen, skipari , Hvannasund
Karl Olgar Joensen, Klaksvík, stýrimaður
Bjørn Kalsø, lærari, Syðradalur
John William Joensen, prentari, Klaksvik

– Fyribils er Erika Elttør einasta kvinnan á listanum, men ein seinasta roynd verður nú gjørd at fáa eina kvinnu afturat á listan, sigur John William Joensen.

Norðoya Sambandsfelag fer at lata inn listan um vikuskiftið, og tá verður greitt, um sjeynda valevnið verður ein kvinna.

Sambært veljarakanningini, sum verður almannakunngjørd í blaðnum í dag, stendur Sambandsflokkurin til at fáa ein tingmann afturat teimum átta.

Sum Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur vísir á aðrastaðni í blaðnum, kann tað metast sannlíkt, at flokkurin fær ein eykavaldan tingmann í Norðoya valdømi – sjálvsagt um veljarakanningin er eftirfarandi.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaði maður, babba, abbi og abbilang

**Sverri Djurhuus**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Kollafjarðar kirkju. Tøkk øll tit, sum vóru um hann til tað seinasta, og tit øll, sum hjálptu so væl til jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Ingeborg**

## Tøkk

Tøkk fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, systir, vermamma, omma og langomma okkara

**Selma Kjærbo**
Fuglafirði

andaðist og varð jarðað.

Tøkk tit, sum vóru um hana, tá ið hon var sjúk. Tøkk øll, sum hjálptu so væl til við jarðarferðina, tøkk fyri troystarrík orð, fyri blómur, kransar og gávur til kirkjuna, og tit, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Eini gleðilig jól og eydnuberandi nýggjár ynskist tykkum øllum.

**Piddi, Terje og Marit**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá okkara kæra og elskuliga mamma, vermamma, omma, langomma og systir

**Ebba Restorff Johansen**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til Ellisheimið í Havn, Sonju Klein prest, organist, kirkjutænarar, sangarar, gravarar, Hotel Hafnia og tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðini. Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.

*Familjunnar vegna*
**Oddvør og Hjørdis**



## Tøkk

*Hjartaliga takki eg øllum, sum vitjaðu inn á gólvið føðingardagin og gjørdu mær dagin minnisríkan.*
*Eisini takki eg fyri gávur, blómur, fjarrit og telefonsamrøður.*

*Gleðilig jól og gott nýggjár.*

**Jutta Heinesen**
**Klaksvík**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Oliva Jóhanna Petrina Sørensen**
**Klaksvík**

andaðist fríggjadagin 12. desember, 88 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin 20. desember kl. 13.00.

**Ása og Villi**
**Brynhild, Simon og Andrea**
**Anja, Høgni og Oliva**
**Sara og Øssur**
**Hjørdis**



# Ringanna Harri á føroyskum

**Meðan triði og seinasti filmurin í røðini um Ringanna Harra koyrir fyri fullum sali kring heimin, kunnu føroyingar nú fegnast um, at fyrsti parturin av bókini er komin út á føroyskum**

BÓKAÚTGÁVA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*– Hóast Ringanna Harri er útgivin í trimum bókum, so helt Tolkien uppá, at talan er um eina bók. Ein bók uppá 1.500 síður, sum kortini er alt ov stutt, segði Zacharias Vang millum annað í framløgu sínari av fyrsta partinum av bókini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Mest lisna skaldsøgan, besta bókin í 20. øld, størsta skaldsøgan í heiminum, uttan iva klassikarin hjá Tolkien og so framvegis. Hetta eru rósandi orðini, sum skaldsøgan Ringanna Harri fær allastaðni, har hon verður nevnd. Øll kenna hesa søguna á ein ella annan hátt. Mong munnu tey vera, sum bæði hava sæð filmarnar og lisið bøkurnar.

Føroyingar hava tó verið noyddir at lisið hana á øðrum máli enn okkara móðurmáli. Men tað broytist nú. Fyrsti parturin av bókini er komin út á føroyskum og er at fáa í bókabúðum kring landið. Og sum skilst so kann tað ikki fara at ganga alt ov long tíð, til hinar koma eisini koma út.

Axel Tórgarð, sum týðir bókina, er komin rættuliga væl áleiðis. Fyrsti partur er komin út, annan part er hann liðugur við, og tað væntar bert umleið ein triðingur av triðja partinum, so hevur Axel, sum fyllir 81 ár í mars, umsett allar 1.500 blaðsíðurnar, sum Ringanna Harri er.

### Bar seg undan

Á framløguni av Ringanna Harra í Bókasøluni í SMS segði Zacharias Wang, at tá heitt varð á Axel um at týða Ringanna Harra, bar hann seg undan. Undanførslur sum aldur og manglandi orka vóru nýttar.
Men Zacharias greiðir frá, at tá tann fyrsti filmurin av Ringanna Harra so kom, var hann á vitjan hjá Axeli. Teir báðir tosaðu so um filmin, og tá segði Axel, at hann hevði umsett yrkingarnar í bókini. Tá var Zacharias ikki seinur at spyrja, hvat so var í vegin fyri at umseta restina av bókini.

Tað gekk ein tíð, men so fór Axel undir at týða hesa miklu bók. Og í dag restar sum sagt bert ein triðingur av bókini, so er hon øll somul á føroyskum.

Zacharias vil tó onki siga um, nær hinar báðar bøkurnar koma út. Hann sigur, at ikki er avgjørt enn, um annar og triði partur skulu koma út í senn ella ikki.

### Leikandi løtt

Mangan hevur verðið sagt, at serliga ungum dámar betur at lesa bøkur á donskum enn á føroyskum. Hetta skuldi koma av, at tær føroysku kundu vera dekan ov háfloygdar til tíðir. Men hetta er ikki longur ein trupulleiki, sigur Kári Árting, leiðari í bókahandlinum í SMS.

Zacharias sigur, at hann hevur tosað við nøkur, sum eru farin í holt við at lesa týðingina hjá Axeli, og tey siga, at tað er leikandi lætt at lesa bókina.

– Tað er eitt ávíst flog yvir skrivingini hjá Axeli, sigur Zacharias Vang.

Myndprýtt bókina hevur Tróndur Patursson. Kápumyndin, sum hann hevur valt, bindur verkið saman við fornsøgur okkara. Hon myndar ein ring, samstundis sum tað er ein dreki. Og tað kann bindast saman við ormin í Sjúrðarkvæðnum.

Hetta er ikki av tilvild, tí Tolkien var kønur í fornmáli okkara, og nógv av nøvnunum í bókini eru fornføroysk. Jóan Hendrik W. Poulsen hevur hjálpt til við at finna nútíðarhóskandi nøvn til persónarnar í bókini.

Ringanna Harri er innbundin, 460 blaðsíður og kostar 350 krónur. Men frá nú av og fram til jóla verður hon at fáa fyri 300 krónur. Tað er forlagið Stiðin, sum gevur bókina út.

# Varðin komin út

**70. bind av Varðanum er komið út. Tíðarritið er komið regluliga út einaferð um árið síðani 1990**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Hetta bindið av Varðanum hevur eitt fjølbroytt innihald við mongum ymiskum søgum.

Jákup Dahl, próstur, skrivaði á gamalsaldri brot úr ævisøgu síni. Hetta er um barnaárini í Vági, inntil hann 15 ára gamal fór til Havnar at ganga í skúla. Ætlanin hevur verið at skriva meira, men helst er ikki meira skrivað. Povl Skårup hevur grein við heitinum Summarnáttin blíða og Nackens polska. Hanna Absalonsen skrivar um bygdarnavnið á Økrum/á Øgrum og Hjalmar P. Petersen um orðið vare í Finninum Fríða.

Kristin Nielsen hevur grein við heitinum Ein trúbøtari á kongstrúnuni, sum er um egyptiska kongin Akhnaton. Hanus Kamban hevur skrivað eina stuttsøgu, sum hann nevnir Hin Sandra. Egon Hansen hevur aftur í ár ættargrein í Nólsoy, hesaferð um fólkini av Stórumýru.

Í heyst varð lisið upp í útvarpinum søgan um tey stóru seglskipini, sum vórðu nevnd Windjamarar. Jóannes Skaale hevur týtt søguna um hesi seglskipini, og fyrsta brot er við hesaferð.

Sune Joensen, sum hevur skrivað manga áhugaverda søgu og hugleiðing um lív og arbeiðslag á bygd fyri 60-70 árum síðani, hevur hesaferð søguna, sum hann nevnir At taka ímóti jólagestum.

Tríggjar stuttsøgur eru eftir Ernest Hemingway: Indiánaralegan, Læknin og kona læknans og Okkurt endar. Tað er Sámal Kristin Jacobsen, sum heur týtt stuttsøgurnar til føroyskt. Sámal Kristian hevur eisini skrivað nøkur orð um skaldið og um søgurnar.

Sámal Jákup Petersen skrivar um sín fyrsta túr til skips, og Tórður Johannesarson skrivar um Fuglakvæðið, eitt dømi um kjakmentan.

Yrkingar eru eftir Óðin Ódn og Absalon Absalonsen. At enda í Varðanum hesaferð er brot úr Eysturoyar vártingsbók fyri 1699, sum Nicodemus Rasmussen hevur skrivað av úr teimum gomlu tingbókunum.
70. bind av Varðanum er 220 síður til støddar og kostar 195 krónur í bókabúðunum. Limagjaldið í Varðanum er 140 krónur um árið, og limir fáa Varðan ókeypis.

# Mín jólabók 2003

**Mín jólabók 2003 er nú at fáa í bókabúðum kring landið. Henda jólabókin er tann 53. í røðini**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*




Í bókini eru nógvar nýskrivaðar søgur: Beinta og Rasmus eftir Riu Hansen, Ravnurin eftir Páll Jacobsen, Herverk eftir Maud Heinesen, Jólakrím eftir Iris Johannu Thomsen, Tina og violinin eftir Elina Mortensen, Svartaklukkan og grindalokkurin eftir Petur Mohr Reinert, Jólagásin ið slapp við lívinum eftir Bettu á Dalinum, Dunnujól eftir Elina á Rógvu, og Søgan hjá ommuni eftir Moniku Stauss Joensen. Sonja Klein, prestur hevur skrivað inngangin Markleysi gleðiboðskapurin røkkur um ævir.

Yrkingarnar eru: Tann fyrsta flykran fall í dag og Ein dag eg lá í bønum eftir Sólrún Michelsen, Vetrarmorgun og Vøgguljóð eftir Halldóru Dam, Jólakvøldsvísa, Abbasa vinur og Tey smáu míni eftir Óðin Ódn, og Jólasálmur og Nyggjárssálmur eftir Kjartan Stakksund.

Afturat hesum eru eisini ein týdd søgn og tríggjar týddar søgur: Tutokanula, Jólakortið, Jól á sjúkrahúsi og Húskallurin hja einkjuni.

Hendan jólabókin er sum sagt tann 53. í røðini. Tann fyrsta kom í 1950, og síðan er hon komin á hvørjum ári uttan í 1958.

Mín jólabók 2003 er 118 síður, heft og kostar kr. 70 í bókabúðunum. Bókin er umbrotin, prentað og heft á Pf. Einars Prent.

Tanya Joensen hevur myndprýtt bókina í ár.